# Gongur væl at bora

Tað var frammi herfyri, at tunnilin, sum SEV borar við Norðskála, liggur ov nær Norðskálatunlinum, og at hann tískil kundi verða til ampa fyri hesum.

– Vit hava verið samdir við Landsverk um at fáa óvildugar norskar serfrøðingar at kanna málið, og út frá tí, sum teir komu fram til, hava vit valt at fylgja teirra ávísingum og lække tunniln frá 8 niður á 10 metrar, umframt at flyta hann seks metrar eystureftir, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV. Arbeiðið verður gjørt í tøttum samstarvi við Landsverk, og gongur sum ætlað. Arbeiðið verður gjørt út frá teirri vitan vit høvdu, og út frá teimum royndum, Landsverk fekk, tá teir gjørdu Norðskálatunnilin, sigur Hákun Djurhuus, sum eisini vísir á, at allar trygdarfyriskriftir alla tíðina verða fylgdar.



# ...teir tosa úr Gøtu...

**Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í samskiftismálum, tók í gjár alment SHEFA 2 kaðalin í nýtslu. Hetta er størsta einstaka íløgan hjá Føroya Tele, og hevur kostað felagnum góðar 120 milliónir krónur**

SAMSKIFTI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna, trýstir á ikonið á telduni, sum letur SHEFA 2 í gongd, meðan tøkningur frá Føroya Tele greiðir frá, hvat hendir á skíggjanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Kaðalin liggur soleiðis úr Klingruni umvegis Hetland, Orkneyoyggjarnar og Skotland niður til Telehouse í London*

»...teir tosa úr Gøtu og
suður í Vág
úr Føroyum til Hetlands
eitt ílatog lá
hin rómverski pávin lá
deyður ein dag
brátt vistu teir tað, brátt
vistu teir tað«

Soleiðis tók Bjørt Samuelsen til í røðu í gjár, tá nýggi SHEFA 2 kaðalin varð alment tikin í nýtslu.

Tað var landsstýriskvinnan sjálv, sum »trýsti á knøttin«. Tað fór fram við at hon við músini trýsti á eitt ikon á telduni, og stutt eftir var sambandi gjøgnum SHEFA 2 kaðalin heilt niður til Telehouse London opið.

Fyri at venda aftur til »Í Gøtu ein dag«:

- »Ílatogið« var fyrsti telegrafkaðalin millum Føroyar og útheimin, sum eisini lá til Hetlands, og sum varð tikin í nýtslu í 1906, segði Bjørt Samuelsen.

Nýggja »ílatogið« gongur frá Klingruni í Hoyvík umvegis Maywick í Hetlandi, Ayre of Cara í Orkneyoyggjunum, Banff og Aberdeen í Skotlandi til Telehouse í London.

- Hesin nýggi kaðalin fer, saman við FARICE, at geva Føroyum trygt fjarskifti úteftir, og at kalla óavmarkaða fjarskiftisorku mótvegis útheiminum í nógv ár frameftir, segði Kristian Davidsen, stjóri á Føroya Tele.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna, sannaði orðatakið, at »mangt broytist á mansins ævi«. Og fáar eru tærvinnur, har broytingarnar ganga skjótari enn júst innan samskiftisvinnuna.

- Minnist sjálv, tá eg sum smágenta var og vitjaði ommu og abba mín heima á Sandi, og speaði oman á telefonstøðina, har hin smarta telefondaman sat og helt skil á leidningunum og vísti mær inn í klivan til telefonina, har telefonboð vóru norðuri úr Havn, segði Bjørt Samuelsen.

## Avtalu við BT

Og landsstýriskvinnan helt fram:

- Lítið grunaði óvitin, at hennara egnu børn fá tíggjuár seinni fóru at ganga við telefon í lummanum, og hava hug at skifta hesar út eins ofta og tannbustina, fyri at kunna vera ajour við nýggjasta móta og møguleikarnar, segði hon.

SHEFA 2 kaðalin er størsta einstaka íløgan hjá Føroya Tele, og hevur kostað felagnum meiri enn 120 milliónir krónur. Hetta er samstundis fyrsti fipurkaðal, sum verður lagdur millum Hetland, Orkneyoyggjar og Skotland. Av tí sama hevur Føroya Tele kunna gjørt eina 15 ára avtalu við British Telecom um at teir nýta SHEFA 2.

Kaðalin gevur stórar møguleikar at bjóða samskiftistænastur til økini nærhendis kaðalinum, ikki minst til oljuvinnuna.

- Og SHEFA-2 kaðalin er ein farleið, til aðrar møguleikar. Eitt nú hava vitanartungar vinnur tørv á at flyta stórar mongdir av dáta millum Føroyar og umheimin fyri ein rímiligan penga, segði Bjørt Samuelsen.

Hetta er ein fýra ára long verkætlan, sum nú er førd út í lívið. Planlegging og botnkanningar vórðu gjørdar á heysti 2005 og í 2006, og sjálvt arbeiðið við at leggja kápilin fór fram í 2007 fram til summarið 2008.

Tað var kanadiska kaðalskipið »IT Intrepid«, ið legði kápilin. Hann er grivin niður í botnin og skuldi verið rættiliga væl vardur, eisini við tað, at hann er vardur við stálverju. Kaðalin er 800 kilometrar langur.

# Elin Smith í Smiðjuni

**Í døgunum 4. til 9. juli hevur listakvinnan Elin Josefina Smith framsýning av 28 oljumálningum í Smiðjuni í Lítluvík**

LISTAFRAMSÝNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað serliga forvitnisliga við hesari framsýningini er, at listakvinnan, Elin Josefina Smith, hevur fingið yrkjaran, Tórodd Poulsen, at skriva yrkingar til 18 av málningunum.

Tey, ið vitja framsýningina, fáa eintak av yrkingunum útflýggjað, er áhugi fyri tí.

- Eg plagi at gera mest glaðar myndir, men hesaferð havi eg einar fimm myndir, ið eru meiri spyrjandi um tilveruna, sigur Elin Josefina Smith.

Til ferniseringina, sum verður í dag, fer Sámal Ravnsfjall at spæla.

Framsýningin er opin fram til mikudagin 9. juli.



*Elin Josefina Smith sýnir fram í Smiðjuni í Lítluvík fram til mikudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*